# Námsfrøðingur til Barnagarðin á Gásamýri

Hevur tú hug til at arbeiða í lítlum, hugnaligum barnagarði, so er tað tær, vit leita eftir. Barnagarðurin á Gásamýri er ætlaður 26 børnum í aldrinum 4-6 ár. Eftir ætlan letur nýggjur stovnur upp á sumri 2009

**Søkt verður eftir námsfrøðingi, 30 t viku, at byrja 01.08.08 ella eftir nærri avtalu.**

Vit ynskja at tú hevur umsorgan fyri børnum. Ert virkin og nýhugsandi. Hevur evni at samstarva við foreldur og starvsfólk, samstundis sum tú kanst arbeiða sjálvstøðugt. At tú vilt vera við til at skapa ein fjølbroyttan, tryggan og mennandi dag saman við børnunum. Hevur fakliga vitan, ið er við til at menna stovnin, og at tú sært fyrimunir framum vansar.

Vit eru ein stovnur í menning og kunnu bjóða tær eitt áhugavert og spennandi starv, saman við fittum og virknum børnum og góðum starvsfeløgum. Har tú ert við til at mynda tað dagliga arbeiðið og gerandisdagin hjá børnunum og har tú hevur ávirkan.

**Setanartreytir**
Starvið er lønt á lønastig 11-18 , eftir sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og KAF

Meira fæst at vita um starvið, við at venda sær til Sigvør Gregersen , leiðara á tlf 743325

Umsóknir saman við avritum av prógvum og viðmælum skulu vera stovninum í hendi innan 11. juni 2008

**Leirvíkar Kommuna**
Postboks 42 · 520 Leirvík

# Davidsen ættin í Kvívík

**Leygardagin 14. juni** verður skipað fyri samkomu fyri eftirkomarunum hjá Aggusteinus og Biritu Davidsen í Kvívík í sambandi við, at Bertie Davidson úr Kanada, sum er abbasonur Johan Hendrik Davidsen, kemur á vitjan.

Johan Hendrik flutti til Kanada í 1903 og hevur nógvar eftirkomarar har. Johan Hendrik var giftur við Wilhelminu Petersen av Válinum, dóttir Peter Frederik Johannesen og Angeliku f. Reinert.

Hugnaløta við ábiti verður í Glæmuni í Kvívík **14. juni kl. 12**, har skyldfólk og onnur áhugað eru vælkomin.

Tey, ið hava hug at koma, kunnu tekna seg á teldupostadressuni: davidsenfamiljan@gmail.com ella á telefon 257342 ella 255016 **innan 4. juni.**
**Kostnaður 100 kr**

Áhugað kunnu hyggja á heimasíðuna
www.faroeiceland.ca

*Vegna fyrireikararnar*
*Marjun í Gong*

# LÆRARAR TIL KOLLAFJARÐAR SKÚLA

**Í Kollafjarðar skúla eru hesi størv leys at søkja:**

Søkt verður eftir:

- Einum lærara til fast starv.
- Tveimum – møguliga trimum – lærarum í tíðaravmarkað starv skúlaárið 2008/2009 vegna niðursett tímatal og avlopstímar. Síðsta starvið er parttíðarstarv, og tímatalið til hetta starvið verður endaliga ásett 1. sept. 2008.

Størvini verða sáttmálasett – tó verður fasta starvið tænastumannasett, um viðkomandi er tænastumannasettur frammanundan.

Í Kollafjarðar skúla ganga komandi skúlaár uml. 135 næmingar í 1. til 9. flokki. 17 lærarar starvast í skúlanum.

Kollafjarðar skúli er ein eitt-sporaður skúli við 9 árgangum.

Vit arbeiða í trimum deildum við einum lærarátoymi í hvørjari deild.

Býtt er soleiðis: 1.-3. flokkur, 4.-6. flokkur og 7.-9. flokkur.

Vit arbeiða støðugt við at menna skúlan, og vit sóknast eftir lærarum, ið eru eldhugaðir, samarbeiðshugaðir og fakliga dugnaligir.

Vit hava ein lærarahóp, ið røkkur fakliga víða. Vit hava brúk fyri at seta lærarar við ymiskum førleikum. Eisini er tørvur á einum lærara, ið kann átaka sær at vera telduvørður.

Tey, ið sett verða, skulu hava læraraútbúgving.

Størvini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1 – 27.4.

Umsókn saman við CV, avriti av prógvum og møguligum viðmælum, verður at senda til:

Kollafjarðar skúla
Botnavegur 2
FO-410 Kollafjørður

í seinasta lagi týsdagin 17. juni 2008 kl. 12.00.

Eru spurningar, eru tit vælkomin at venda tykkum til skúlastjóran, Karin Hammer, á tlf. 30 25 53 ella 22 14 07 ella á teldupostbústaði karin.hammer@skulin.fo

# Hús til sølu

**Um hóskandi boð fæst, verður íbúð seld á Berjabrekku 37**

**Ringið 322524**

**Vestmanna Skúli**
Toftavegur 12 · FO - 350 Vestmanna · Føroyar
Tlf. 470100 · Fax: 470101 · vestmanna@skulin.fo

# LÆRARASTØRV í Vestmanna Skúla

**lýst leys til setanar frá 1. august 2008.**

Søkt verður eftir 5 lærarum, einum í føstum fulltíðarstarvi, trimum í tíðaravmarkaðum fulltíðarstarvi og einum í tíðaravmarkaðum parttíðarstarvi , (um 20 tímar/vikuna)

- fyri eftirløntan lærara, lærarar í farloyvi, lækkað tímatal, stuðulstímar og avlopstímar

**Søkt verður eftir lærarum, sum**
- undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við lærarar skúlans skulu undirvísa og taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- duga at samstarva og eru fyrikomandi
- eru fúsir at taka á seg tær uppgávur, sum eru í skúlanum

**Harumframt skulu lærararnir hava førleika at átaka sær eina ella fleiri av hesum lærugreinum/lærugreinaøkjum:**
- ítrótt og svimjing, dreingir
- føroyskt, týskt, enskt og danskt
- náttúru/tøkni, alisfrøði og evnafrøði
- træ- og jarnsmíð og motorlæru
- tónleik, heimkunnleika, handverk og list
- kristni, søgu og samtíð
- námsfrøðiligar stuðulstímar
- tímar vegna serligan tørv og standa fyri lesi- og rokniroyndum
- vera flokslærarar

**Førleikakrøv:**
Læraraútbúgving og linjulestur ella samsvarandi førleika í nevndu lærugreinum/lærugreinaøkjum.

Ynskiligt er, at umsøkjarar hava starvsroyndir í fólkaskúlanum.

Tó kunnu læraralesandi, ið lúka prógv í summar, eisini søkja størvini.

**Lønar- og setanartreytir**
Setanarøkið er Vestmanna Skúli. Tey, ið sett verða, eiga at tola broytingar starvinum viðvíkjandi.

Størvini verða lønt í lønarflokki 18.1 – 27.4 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag. Tíðaravmarkaðu størvini verða sett fyri skúlaárið 2008 - 2009.

**Umsóknir**
Umsóknir við c.v. og avriti av prógvum skulu vera skúlastjóranum í hendi í seinasta lagi hósdagin 14. juni 2008, kl. 16.00.

Fleiri upplýsingar um størvini fært tú við at ringja til Vestmanna Skúla tlf. 470100, fartlf. 230100, til varaskúlastjóran fartlf. 230101 ella við at senda teldupost til skúlastjóran olavur.winther@skulin.fo

**Vestmanna Skúli** hevur komandi skúlaár umleið 192 næmingar og um 22 lærarar. Tú kanst lesa meira um okkum á heimasíðuni www.skulin.fo/ves/. Vestmanna Skúli er kendur fyri at vera næmingavinarligur og grønur skúli. Skúlin arbeiðir í løtuni við hesum evnum: at menna trivnaðin, byrjanarundirvísingina, samstarvið við vinnulívið og at geva næmingunum fjølbroyttar avbjóðingar.